

*Íbúðarblokkarnir hómast nú aftanfyri raðhúsini*

*Innan úr raðhúsunum er frálíkt panoramaútsýni yvir Argir, Havnina og partar av Hoyvíkini*

*Raðhúsini Undir Kongavarða eru um at verða liðug. Hetta útsýnið kostar 2,9 milliónir, og øll húsini eru longu seld. Tey fyrstu flyta inn um góðan mánað*

# Seta seinasta naglan í

**Tað líður væl við fyrsta byggistigi Undir Kongavarða. Fyrstu familjurnar flyta inn í komandi mánaði, og gravgangur er framvegis eftir húsum har**

BYGGING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*

- Tað gongur væl. Vit eru við at verða lidnir við raðhúsini, og nú verður gjørt klárt hjá teimum fyrstu familjunum at flyta inn. Tað sigur Valbjørn Dalsgarð, byggimeistari fyri byggingini Undir Kongavarða, tá vit spyrja hann, hvussu tað líður við byggingini.

Í hesum krepputíðum eru tað, hóast alt, ikki bara sorgarsøgur, ið eru at hoyra úr byggivinnuni.

Byggiverkætlanin Undir Kongavarða fór veruliga í gongd fyrst í farna ári, og nú gott og væl 14 mánaðir seinni eru raðhúsini í fyrsta byggistigi um at verða liðug.

Øll húsini eru seld, hóast astronomiska kostnaðin á 2,9 milliónir fyri húsið, og tey fyrstu fara at flyta inn fyrst í komandi mánaði, og innan leingi skuldu øll húsini verið búsett.

- Raðhúsini eru um at verða liðug, og í løtuni arbeiða vit við at seta síðstu íbúðarblokkarnar upp. Tveir blokkar eru komnir upp, og tveir eru við at verða settir upp, greiðir Valbjørn Dalsgarð frá.

### Darvaðir av veðri

Eftir øllum at døma var ætlanin at fleiri longu skuldu verið flutt inn í raðhúsini Undir Kongavarða. Men veðrið hevur í fleiri førum spælt teimum eitt puss.

- Vit verða órógvaðir av vindi og av frosti, og í vetur hevur verið fitt av báðum, sigur Valbjørn Dalsgarð, byggimeistari.

### Annað byggistig útsett

Tað gongur eftir øllum at døma sera gott við fyrsta byggistigi av verkætlanini. Men enn vil Valbjørn Dalsgarð ikki tosa nakað serligt um annað byggistigið.

- Vit konsentrera okkum bara um fyrsta byggistig beint nú. Vit hava nógvar fyrispurningar til næsta byggistigið, men tíðirnar eru kanska ikki tær bestu beint nú at fara undir tað. Vit skulu hava selt stóran part av seinna byggistigi, áðrenn vit fara at arbeiða við tað, vísir Valbjørn Dalsgarð á.



Skeið 5. mai ‘09 (fá pláss)
Skeið 6. mai ‘09

**Leskiligt fjølbroytni í kantinuni**

- ger einfaldan & góðan mat, við teimum ráðvørunum tú longu hevur

**Arbeiðir tú í kantinu?** So ert tú vælkomin til ein dag í køkin, har vit hitta onnur kantinufólk og har vi bjóða hvørjum øðrum av, at gera nakað annað enn tað, sum vit eru von. Fjølbroytni í køkinum er ikki bara at keypa nógvar og dýrar rávørur, men heldur at bjóða teimum rávørum, sum vit hava, av.

Vit skulu royna arbeiðshættir, hugsanir og smakkir, sum vit kunnu toga upp úr hattinum, tá ið vit gera mat. So gestirnir uppliva, at nakað nýtt hendir og at køkurin kann broytast.

**Luttakararnir fáa íblástur og nógv góð hugskot** við sær, sum teir kunnu lata í grýturnar. Brennidepilin verður settur á handverk í samband við útskering og hugt verður eftir smakki og hvussu vit smakka matin til. Dentur verður lagdur á at gera fjølbroyttan mat við avmarkaðum tilfari.

**Tilmelding og les meiri** á www.synergi.fo. Tú ert eisini vælkomin at ringja til okkara á 322355 ella 227464.

**MAX. 15 LUTTAKARAR**

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn
Tel. 32BELL (322355) - www.synergi.fo - synergi@synergi.fo